ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

1. november 2021
Mál: 21/21783
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-063/2021

Svar uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-063/2021 eftir tingskipanini § 52a til Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismann í almannamálum, frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, um møguleikan at fáa stuðul í Suðuroynni

Fyrispurningur er ljóðar soleiðis:

1. Hvussu nógv fólk við serligum avbjóðingum fáa stuðul í Suðuroynni?
2. Hvussu nógv fólk hava fingið játtaðan stuðul, uttan at hetta er sett í verk, og hvørjar eru orsakirnar.
3. Hvussu arbeiðir Almannaverkið við at nøkta tørvin á stuðlandi fyriskipanum til fólk, sum bíða eftir stuðli ?
4. Hvørji tilboð hevur Almannaverkið til fólk við demens og ella røktartørvi, sum eru undir 67 ár og búgva í Suðuroynni?

Svar:

Til spurning nr. 1

Í løtuni fáa 11 borgarar í Suðuroynni 1 - 1 stuðul.

Til spurning nr. 2
Tað eru 4 borgarar, sum hava fingið játtað stuðul, sum ikki er settur í verk. Orsøkirnar til, at stuðulin ikki er settur í verk, er at tað ikki er borið á mál við at finna starvsfólk, sum vilja átaka sær uppgávuna, at arbeiða sum stuðul.
Tá tað ikki eydnast at finna stuðlar, plagar Almannaverkið at bjóða borgarunum tilboð á verkstaðnum á Bakka ístaðin, men tað eru ikki øll, sum ynskja at taka av tí tilboðnum.

Til spurning nr. 3
Almannaverkið arbeiðir alla tíðina við at veita borgarunum eina góða tænastu. Lýst verður við jøvnum millumbilum eftir stuðlum, men tað er trupult at fáa fólk til stuðulsuppgávur. Hetta ger seg galdandi um alt landið, ikki bara í Suðuroynni. Sí eisini sp. 2 Almannaverkið roynir at bjóða aðra hóskandi tænastu, tá tað ber til.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Til spurning nr. 4
Landsstýriskvinnan hevur fingið upplýst frá Almannaverkinum, at tey ikki eru vitandi um borgarar undir 67 ár við demens í Suðuroynni, og upplýst verður eisini, at ongin umsókn er móttikin har søkt verður um tænastu til borgara við demens í Suðuroynni.

Tað eru í løtuni 8 borgarar í Suðuroynni við røktartørvi, sum fáa tilboð frá Almannaverkinum.
Teir borgarar, sum búgva á Eiðisgarði fáa dagtilboð á Eiðisgarði. Í løtuni er talan um 4 borgarar.
2 borgarar við røktartørvi fáa tilboð á verkstaðnum á Bakka. Og 2 borgarar við røktartørvi fáa stuðul heima. Harav tann eini eisini fær tilboð á Verkstaðnum á Bakka.

Tórshavn 1. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður í almannamálum